# Viljastyrkin lærdi hann at lesa

**22 ára gamli Filip Mortensen úr Havn fann ikki út av tí, fyrr enn hann byrjaði í studentaskúlanum, at hann var orðblindur. Hann hevur onga serliga serundirvísing fingið, men treiskni og viljastyrki hansara hava hjálpt honum, so tað gongur betur nú**

Randi Jacobsen

Nógvir skúlanæmingar, sum eru skrivi- og lesiveikir ella orðblindir smokka niðurímillum í skúlanum. Teir halda seg ikki til og royna bara at sleppa undan øllum uppgávum.

Men soleiðis var ikki við Filip Mortensen úr Havn.

- Eg helt meg bara vera dovnan. Tá ið eg gekk í 4.-5. flokki vóru nakrir seinir næmingar, og eg helt meg bara vera ein av teimum, sigur Filip Mortensen.

Tá ið hann kom longur upp í skúlanum og gekk í 7. og 8. flokki, sá ein lærari, at nakað var galið og bjóðaði dreinginum hjálp.

- So setti eg meg bara sjálvur niður at lesa, tí eg var treiskur og vildi læra at lesa og skriva, sigur Filip Mortensen.

Tað var meira hugaligt hjá honum at lesa tekstir, sum høvdu hansara áhuga, enn at skula lesa skúlabøkurnar og tekstir, ið ikki vóru so viðkomandi.



*Filip Mortensen lærdi seg við treiskni at lesa. Hann livir eitt gott lív saman við unnustuni Rebeccu og dóttrini Jonu Bjørt. Hann er til reiðar at hjálpa øðum, sum hava ilt við at brjast við sítt orðblindni*

### Gongur betur og betur

- Tað tekur sína tíð hjá mær at lesa, men eg komi ígjøgnum tekstir, sum eg tími at lesa. Nú er eisini so nógv spennandi at finna á internetinum, og viljasterkur sum eg eri, gongur betur og betur.

Filip Mortensen fór í studentaskúla eins og flokksfelagarnir. Har varð hjálp boðin honum, men tað gekk so mikið illa, at hann gavst og fór í staðin á Tekniska skúlan í Havn. Ta útbúgvingina fullførdi hann, ikki minst tí at lærararnir vóru so hjálpsamir.

- Tað gongur betur og betur at lesa, men við skrivingini er verri, sigur hann.

Nú vinmenninir allir eru vorðnir studentar og eru farnir at lesa víðari, hevur Filip Mortensen sett sær fyri at fara víðari. Hann hevur hug at fara til Danmarkar á HF ella at fáa sær aðra miðnámsútbúgving.

# Átakið fer at gera mun

**Mentamálaráðið valdi at seta pening av til átaki móti orðblindni, tí tað sømir seg kki einum samfelag at sleppa skrivi- og lesiveikum fólkum upp á fjall, sigur Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í mentamálum**

Randi Jacobsen

Alt byrjaði við eini ráðstevnu, sum felagsskapurin Lions tók stig til og skipaði fyri saman við Mentamálaráðnum.

Saman við Hans-Paula Christiansen, formanni í danska orðblindafelagnum varð aftaná farið undir at útbúgva lærarar at undirvísa orðblindum og lesi- og skriviveikum fólkum.

Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í mentamálum heldur tað vera týdningarmikið at lofta skúlanæmingum beinanvegin, men her verður fokus sett á tey vaksnu við lesi- og skrivitrupulleikum.

- Nógv vaksin fólk hava ongantíð fingið nakra hjálp og hava tí havt torført við at koma víðari í lívinum, sigur Helena Dam á Neystabø.

Í fjør varð ein serstøk konto gjørd á fíggjarlógina til lesi- og skriviveik, og tað varð gjørt fyri at varpa ljósa á henda trupuleika, sum hevur verið fjaldur og tagdur burtur. Sum aðrir fjaldir trupuleikar hevur hesin verið fongdur við skomm.

### Eitt stig á leiðini

Helena Dam á Neystabø fegnast um, at komið nú er so langt, at teir fyrstu lærarnir nú hava fingið hesa útbúgving, og at lærarar bæði á vinnuskúlum, miðnámsskúlum og kvøldskúlum nú hava førleika til at hjálpa orðblindum og lesi- og skriviveikum fólkum og ráðgeva teimum í at brúka tey hjálpartól, sum finnast.

- Tað sømir seg ikki einum samfelag, ið nevnir seg eitt framkomið samfelag at sleppa teimum orðblindu upp á fjall. Tey kunnu ikki gera við, at tey hava fingið hendan trupulleika. Vit eiga eisini at hava í huga tey vánalig úrslitini í Pisa - og øðrum kanningum, sigur Helena Dam á Neystabø.

Hon dugir ikki at siga nær farið verður víðari við at útbúgva fleiri lærarar.

# Kend orðblind fólk

*Nógv orðblind fólk hava klárað seg væl í lívinum, nú sum áður. Orðblind fólk eru listafólk, rithøvundar, arkitektar, uppfinnarar og politikarar. Her eru nøkur teirra:*

*Harry Belafonte, Tom Cruise, Alexander Graham Bell, Leonardo da Vinci, Jørn Utzon, Andy Warhol, Muhammed Ali, Steve Redgrave, Winston Churchill, Carl Gustav kongur í Svøríki, Thomas Jefferson, John F. Kennedy, H. C. Andersen, Henry Ford, Agatha Christie, F. Scott Fitzgerald, Walt Disney og Søren Kragh Jacobsen.*



Framhald á næstu síðu